# Oljubryggja í Fuglafirði fyri 12,5 mió kr.



Fuglafjørður fær nú eina 70 metrar langa oljubryggju, sum fer at kosta einar 12,5 mió krónur

Mynd: Vilmund Jacobsen

**Eitt minnilutauppskot hjá Dánjali Vang, býráðslimi í Fuglafirði, um at gera eina 70 metrar langa oljubryggju sunnanfyri Ennibryggju er samtykt á býráðsfundi í Fuglafirði**

OLJUBRYGGJA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á býráðsfundi í Fuglafirði hóskvøldið 2. mars var málið um bygging av oljubryggju á skránni.

Havnanevndin hevði býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin í nevndini, Signar á Brúnni og Tórfríður Abrahamsen, mælti til at leingja Ennibryggjuna heimeftir.

Minnilutin, Dánjal Vang, mælti til at gera eina oljubryggju sunnanfyri Ennibryggju, sum verður umleið 70 metrar til longdar og kemur at kosta einar 12,5 milliónir krónur.

Jón N. Olsen mælti til at gera eina bryggju millum Fóðurbryggjuna og Ennibryggjuna, men uppskotið hjá honum fall.

### Tríggir fyri

Úrslitið av býraðsfundinum hóskvøldið varð, at minnilutauppskotið hjá Dánjali Vang varð samtykt við fimm atkvøðum fyri, trimum ímóti og ein atkvøða var blonk.

Tey, sum atkvøddu fyri uppskotinum hjá Dánjali, vóru Sigurd Simonsen, Elisabeth Eldevig, Eyðun á Lakjuni, Jan Toftegaard og Dánjal Vang.

Signar á Brúnni, Tórfríður Abrahamsen og Jón N. Olsen atkvøddu ímóti – og Petur Abrahamsen atkvøddi blankt.

Uppskotið hjá meirilutanum í havnanevndini fall sostatt burtur.



*Dánjal Vang, býráðslimur, fekk sítt minnilutauppskot samtykt á býráðsfundi seinasta hóskvøld*

Mynd: Vilmund Jacobsen

## Bilur út av millum Hov og Porkeri

FERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í vikuskiftinum fór ein bilur niðan av landsvegnum millum Hov og Porkeri. Bilurin fór eina ferð runt oman eftir vegskráanum og endaði á liðini.

Óhappið hendi, tá ið bilurin í hálkuni fór tvørur á vegnum og endaði vestanfyri landsvegin.

Tveir persónar vóru í bilinum; teir fingu eingi likamlig mein. Hinvegin fekk bilurin materiellan skaða.

# Meldaði bilstuldur

**Ein vágbingur meldaði ein stjolnan bil til løgregluna sunnunáttina. – Vit fóru avstað við tveimum løgreglubilum beinanvegin og byrgdu soleiðis uppfyri, at menninir í ringasta føri gjørdu feigdina um seg í bygdum øki, sigur Jaspur Vang, løgreglumaður**

BILSTULDUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Sunnunáttina fekk løgreglan á Tvøroyri fráboðan um, at ein bilur var stjolin í Vági.

Tað var ein maður, sum undraði seg yvir, at bilurin hjá grannanum var burtur hesa tíðina av samdøgninum. Hann ringdi til eigaran, og skjótt var greitt, at bilurin var stjolin. Maðurin, sum hevði staðfest, at bilurin var burtur, gjørdi ikki matari enn at ringja til løgregluna á Tvøroyri beinanvegin.

Jaspur Vang, løgreglumaður, fegnast um, at grannin "handlaði" so skjótt og boðaði løgregluni frá.

– Soleiðis kundi ein ábyrgdarfullur maður vera við til at byrgja uppfyri, at ungir menn í stjolnum bili komu inn í bygt øki og í ringasta føri gjørdu feigdina um seg.

Jaspur Vang sigur, at løgreglan á Tvøroyri fór avstað beinanvegin í tveimum bilum.

– Vit mettu, at hetta vóru ungir menn í Vági, sum ætlaðu sær norður á Tvøroyri í dans. Og tað varð rætt mett, sigur hann.

### Í aðru atløgu

Menninir í stjolna bilinum snýttu tann fyrra løgreglubilin og koyrdu framvið honum, hóast løgreglan gav tekin um at steðga.

– Vit møttu bilinum á lutfalsliga breiðum vegi, so hann smeyg sær fram við okkum.

Men, sigur Jaspur:

– Tá ið menninir í stjolna bilinum møttu næsta løgreglubilinum, gekst ikki so væl hjá teimum, tí nú sluppu teir ikki fram við.

Hann sigur, at løgreglan royndi at sperra vegin av, tí teir stúrdu fyri, at menninir í stjolna bilinum kundu vera ávirkaðir av rúsdrekka.

– Um so var, kundi vandi staðist av, um teir komu inn í bygt øki á Tvøroyri.

Jaspur sigur, at endin av hesum var, at menninir í stjolna bilinum stoyttu spakuliga móti høgra bakskermi á løgreglubilinum og endaðu í veitini.

– Men tá høvdu teir longu tikið ferðina av bilinum, so materielli skaðin var lutfalsliga lítil, og eingin persónsskaði stóðst av hesum.

### Blóðroynd tikin

Jaspur Vang fegnast um, at maðurin, sum fekk illgruna um stjolna bilin, boðaði løgregluni frá so skjótt.

– Hvør veit, um hetta í ringasta føri ikki kundi endað við onkrum verri, um menninir komu inn í bygt øki, sigur hann.

Illgruni er um rúsdrekkakoyring, og tí er blóðroynd tikin av monnunum, eins og báðir verða skuldsettir fyri brúksstuldur.

# Oljugoymsla fyri 25 mió kr.

OLJUFELAG
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Fuglfirðingar fáa meira enn eina oljubryggju, sum býráðið samtykti á fundi hóskvøldið.

Um miðjan februar varð eisini eitt nýtt oljufelag stovnað, sum hevur til endamáls at byggja eina oljugoymslu í Fuglafirði. Verkætlanin hevur til endamáls at skapa grundarlag fyri at veita tungolju í Føroyum – til skip, virkir og komandi viðskiftafólk annars.

Stjóri í nýggja felagnum er Janus Rasmussen, sum frammanundan er stjóri í P/F Bergfrost í Fuglafirði. Nevndarformaður er Dávid Jacobsen, ið umboðar P/F Vinnu í Gøtu.

Janus Rasmussen segði í samrøðu við Sosialin, tá ið felagið varð stovnað, at verkætlanin í Fuglafirði kemur at kosta einar 25 mió kr.

– Fuglafjarðar kommuna hevur útvegað okkum grundøki, og vit hava fingið prinsipielt byggiloyvi. Vit miðja eftir, at goymslan og útbúnaðurin annars stendur uppi og klár at taka í nýtslu skjótast gjørligt. Kortini er órealistiskt at hugsa sær, at verkætlanin stendur liðug longu í hesum árinum, segði stjórin.

Hann vísti á, at tørvurin á einum veitara av tungolju í Føroyum er veksandi – og at hann væntandi eisini kemur at veksa sum frá líður.

– Jú, tað er einki at ivast í, at eftirspurningurin eftir tungolju í Føroyum er veksandi, segði stjórin í nýggja oljufelagnum.